## Kløkkur av Capello

Enski landsliðsvenjarin í fótbólti, Fabio Capello, er ein harður hundur, og summir spælarar vóru ovfarnir av hansara venjingum fyrstu tíðina. - Hann var óhugnaligur á fyrsta venjingardegnum. Hann steðgaði allatíðina spælinum og flutti spælarar fysiskt, so teir stóðu á rætta staðið. Tað var ræðandi, sigru Wayne Rooney. Úrslitið hava verið góð hjá enska landsliðnum, síðani Capello tók við sum venjari.



## Carragher vil hava styrk

Skal Liverpool spæla við um enska meistaraheitið næsta kappingarár, er neyðugt, at felagið keypir tveir ella tríggjar góðar spælarar í summar. Tað heldur verjuspælarin Jamie Carragher. - Vit eru ikki so langt frá toppinum, sum nógv fólk halda. Fáa vit tveir ella tríggjar spælarar afturat, kunnu vit spæla um meistaraheitið, sigur Carragher við blaðið News of the World.

### StÍF-Kyndil 28-16 (12-7):

# Stórsigur til StÍF

**Eftir at hava verið mest sum sørir í tríggjar mánaðir, vant StÍF burtur úr Kyndli í gjár**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Tað sást illa, at annað liðið ikki hevði vunnið í tríggjar mánaðir, meðan hitt hevði fokus á FM-finaluni. Ella í øllum førum sást ikki, hvør var hvør, tá StÍF tók ímóti Kyndli sunnudagin.

Kyndil fekk kanska fyrstu trý málini í dystinum, men so var liðugt. Hinar 56 minuttirnar skoraði Kyndil bara 13 ferðir móti væl spælandi strandaverjuni og ikki minst Marian Cirloganescu í StÍF-málinum.

Í hinum endanum var talan kanska ikki altíð um skjóta og flótandi spælið, sum StÍF í fleiri ár var garantur fyri. Men góða verjan gav fleiri skjótaálop, og so prógvaði Cristian Preda – ið annars hevur verið í dvala í nakrar mánaðir – hví hann fyrstu nógvu umførini var ovastur á máltindinum.

Tað kann væl vera, at sálarligu timburmenninir hjá Kyndli hava verið til staðar eftir taptu steypafinaluna móti Neistanum. Men tað í sjálvum sær var ikki øll frágreiðingin.

StÍF hevur seinastu vikurnar víst, at spælið hevur verið í stórari framgongd, og fáur hevur ivast í, at ein sigur var í væntu heilt skjótt. Og enn er munurin somikið lítil, at StÍF væl og virðiliga er við í kapprenningini um finalupláss.

Tað er Kyndil eisini. Men sveiggini í avrikunum hava verið rættiliga stór seinastu tíðina, og tað er avgjørt neyðugt hjá liðnum at lyfta botnin í hesum, um stigatalvan ikki skal gerast heilt óhugnaligur lesnaður, tá farið verður undir seinastu umførini.




**Strandingar hølvaðu Kyndil av, tá liðini hittust sunnudagin, og so er StÍF aftur partur av oddastríðnum í Atlantic Airways-deildini**

### FAKTA UM DYSTIN

**StÍF-Kyndil 28-16 (12-7)**
**10 min:** 3-3
**20 min:** 7-3
**40 min:** 20-9
**50 min:** 24-10
**Málskjúttar**
**StÍF:** Cristian Preda 11(2), Borgar Danielsen 6(1), Jóannes Prestá 5, Jógvan Berg 2, Marius Joensen 2, Sune Ersntsson 1, Pauli G. Hansen 1
**Kyndil:** Tummas Pauli Hanusarson 4, Bárður Johannesen 3, Josef Abrahamsen 3(1), Hans Áki Dal-Christiansen 3, Kenn Zachariassen 2(1), Julian Johansen 1
**Brotskøst:** StÍF 4, Kyndil 5
**Útvísingar:** StÍF 2, Kyndil 5
**Dómarar:** Dánjal Samuelsen & Heri Petersen

## Dómarararnir fingu ikki boð

**Aðru ferð á rað vóru trupulleikar við dómarunum, tá Tjaldur og VB skuldu spæla**

Tá tey bæði liðini hittust í Vági, var hetta samstundis, sum finaludagur var fyri yngru deildirnar.

Her verða øll tey fremstu dómarapørini í landinum brúkt, og tí bar ikki til at fáa nakað av hesum til Vágs, hóast reglurnar fyriskriva, at allir dómarar í fremstu deildini skulu hava staðið dómararoyndina.

Og í gjár var aftur galið. Hesa ferð grundað á eina misskiljing, sum bar við sær, at Ragnar Simonsen og Rúni Mohr, sum skuldu døma dystin, als ikki høvdu fingið boð um hetta. Og longu í gjárkvøldið sendi Hondbóltsdómarafelagið út tíðindaskriv, har teir harmaðust hendingina.

– Av misgávum, hetta millum Hondbóltsdómarafelagið og Hondbóltssamband Føroya, bleiv skeivt yvirlit sent út, til ásettu dómarar til dystin.

– Tað harmar okkum í Hondbóltsdómarafelagnum almikið, at slíkir feilir henda, tó at vit mugu ásanna, at slíkir feilir koma fyri. Men vilja vit gera alt hvat liggur í okkara makt, at slíkir feilir ikki henda aftur, skrivar felagið í skrivinum, sum varð sent fjølmiðlunum í gjárkvøldið.

### Tjaldur-VB 23-22 (15-9):

# Eitt mál frá sensatiónini

**Tjladur tók sær ov nógv av løttum seinastu løtuna, og so var um reppið, at VB fór úr Runavík við einum sera óvæntaðum stigi**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Á pappírinum var talan bar um avgreiðuspurning. Tjaldur hevur kapprunnið við Stjørnuna um oddasessin alt kappingarárið, og á heimavølli móti VB var talan bert um setning, sum skuldi fáast frá hondini. Ikki minst, tá havt verður í huga, at Tjaldur vann trygt, tá liðini hittust í Vági fyri bara viku síðani.

Fyri steðgin var nú heldur ikki tað stóra, sum bendi á, at VB skuldi gera nakað serligt. Tjaldur var greitt omaná, og hevði VB hug at muta ímóti, varð ferðin uttan nakað tvætl sett eina tonn upp, soleiðis at munurin aftur kundi økjast.

Fyrstu 20 minuttirnar eftir steðgin var heldur einki, sum broytti hetta, men so kom VB brádliga fyri seg. Tjaldur tóktist ikki leggjaj so nógv í at seta ferð á aftur, men tá VB við seks málum á rað hevði minkað munin í tvey mál, stóð brádliga nógv á. Ikki minst, tá Cornelia Rimbu brendi brotskastið, sum annars skuldi avgjørt tað heila.

Ein vágbingur stóð tó eisini í málinum hjá Tjaldri, og Guðrun í Lágabø vann nakrar bjargingar fram júst í røttu løtuni, og so megnaði VB akkurát ikki at fáa stig burturúr.

Men tær sendu eina kraftiga ávaring til restina av feltinum. Viljin at arbeiða og stríðast fyri liðnum hevur altíð verið framúr hjá VB, og eitt úrslit sum hetta bendir á, at tað á ongan hátt er nøkur ógjørlig uppgáva, tá tær skulu takast við StÍF og VÍF í dystuna, sum helst gera av, hvør noyðist eina deild niður at spæla komandi kappingarár.

### FAKTA UM DYSTIN

**Tjaldur-VB 23-22 (15-9)**
**10 min:** 5-5
**20 min:** 9-7
**40 min:** 18-14
**50 min:** 23-16
**Málskjúttar**
**Tjaldur:** Adina Petrea 8, Cornelia Rimbu 5(1), Mary-Ann Zachariassen 2, Jacoba Langgaard 2, Alina O. Anghel 2(1), Jóhanna í Króki 2, Annika Thomsen 1, Heidi á Lakjuni 1
**VB:** Svava Vestergaard 5, Christina Holm 5, Andrea Nielsen 4, Migle Senvaityte 4(1), Bára K. Mortensen 3, Sára Samuelsen 1
**Brotskøst:** Tjaldur 3, VB 1
**Útvísingar:** Tjaldur 3, VB 1
**Dómarar:** Kári Hansen & Zoran